# Kristnir jólasiðir: Adventskransurin

**Øll kenna jólatræið og jólahosuna, men hvar er kristna innihaldið í hesum og øðrum, ið vit knýta til jólini?**



Jólatræið kom upprunaliga úr Týsklandi, og ger adventskransurin eisini. Sagt verður, at tann kransurin í Danmark varð tendraður á Amalienborg undir fyrra veraldarbardaga av Alexandrinu drotning, sum var kona Christian 10. og sum upprunaliga var týsk.

Tað var kortini ikki fyrrenn í 1920, tá Suðurjylland kom aftur til Danmarkar í sambandi við sameiningina, at siðurin av álvara kom til landið við teimum dønunum, sum í nærum 60 ár høvdu livað undir týskum harradømi.

Við til adventskransin hoyra upprunaliga tey violettu bondini, tí violett er liturin fyri adventstíðini. Orsøkin til hetta er, at advent í sínum uppruna er ein bóts- og føstutíð undan jólum. Tí eins og ein fastar undan páskum, so fastaði ein áður fram móti jólum. Tað ger ein enn onkustaðni.

Í Danmark hevur adventskransurin lutvíst tjóðarlitirnar við reyðum og hvítum ljósum. Hetta kemur ikki minst av, at adventskransurin fekk sítt næsta gjøgnumbrot undir Seinna Heimsbardaga, har tjóðskaparkenslan var sterk og har danir høvdu brúk fyri øllum tí ljósinum, teir kundu fáa.




















